# Esbjerg hevur okkurt til øll

**Esbjerg kenna nógvir føroyingar, og nógvir føroyingar búgva eisini í fimtstørsta býnum í Danmark. Býurin hevur ein hóp at bjóða vitjandi, bæði innan náttúru, mentan, list, ítrótt, handilslív, søvn, og merkisstaðir, ið vitjandi eiga at síggja**









Um ein vitjar í Esbjerg, so skortar ikki við tilboðum til ferðamannin. Og tað ger ikki mun, um ein er eina á ferð, ella familjan er á ferð, tí tilboðini eru sera mong, og venda sær til allar áhugabólkar. Skal takast úr rúgvuni, so kunnu nevnast søvn av alskyns slag, og upplivingar og tiltøk til alla familjuna, og tað ger ikki mun, hvørt einum dámar hetta ella hatta, tí í Esbjerg finst okkurt til øll. So stórt er útboðið av tiltøkum, sýningum, merkisstøðum og øðrum.

Flest øll, ið onkutíð hava vitjað Esbjerg, kenna spennandi saltvatnsakvariumið, har ein sær bæði fisk og kóp.Her hugna bæði børn og vaksin sær óført.

### Svimjing

Esbjerg hevur eisini stóra svimjihøll, ið so avgjørt hevur avbjóðingar og stuttleika, umframt at møguleikar eru til kaffi og ábit.

Vitjar ein Sport og Event Park, ella Svømmestadion Danmark, so er lagt upp til vatnleik fyri alla familjuna í størstu svimjihøll í Danmark. Har eru yvir 10.000 fermetrar við upplivingum til alla familjuna. Tropiskt baðiland, skreiðibreytir, bylgju, barna- og babyhylar. Har er rómverkst bað við hitarúmi, dampbað og heitum og køldum hylum. Og har er 50 metra hylur við 1 metra-, 3 metra- og 5 metra-vippum.

Yvirhøvur er vatn- og maritima síðan væl umboðað, og fiskivinnan hevur jú eisini sína søgu í Esbjerg.

List, tónleikur, gangitúrar, tyrlutúrar, vitjan á søvnunum og kendum støðum. Alt er í ríkiligt mát partur av tí, ið Esbjerg hevur at bjóða vitjandi.

### Tónleikahús

Tónleikahúsið í Esbjerg, Musikhuset Esbjerg, er við 8000 fermetrum staðið, har fólk í Suðurjútlandi hittast at hoyra tónleik og síggja sjónleik.

Húsið er eisini karmur um ráðstevnur, stevnur og fundir av ymsum slag.

Har kan ein uppliva alt frá konsertum, stand up og til opera og ballett.

### Bíligt og liggur væl fyri

Tað nýtist ikki at verða dýrt, um ein ferðast og gistur í Esbjerg.

Hotel Cabinn Esbjerg hevur lægstu prísir, og liggur væl fyri miðskeiðis í býnum. Nýmótans kømur við øllum tí, ið einum tørvar, skal ein gista væl. Hotellið hevur ókeypis parkingsmøguleikar og internet.

Talan er um hotel við trimum stjørnum og tað er renoverað í 2005.

### Søguligt stað

Esbjerg er í dag 5. størsti býur í Danmark, og er ein býur við tí ferð og teim hentleikum og tilboðum, ið slíkur býur skal hava.

Men tað stóð ikki í kortunum, at so skuldi verða, tá eitt lógaruppskot um bryggjubygging við Esbjerg í 1868 var orsøk til nógv kjak í Fólkatinginum og síðani Landstinginum. Uppskotið vann frama, havnin varð bygd, og grundin løgd undir nú 5. størsta bý í Danmark. Úr ongum til menn, ið gingu undan, og wild west umstøður, til stórtíðir á bæði mentanarliga-, vinnuliga og útbúgvingarøkinum.

Men kann tað veruliga vera so, at onki var frammanundan á staðnum? Forn- og fortíðin er alt meira komin undan kavi, og tað eru sanniliga ikki trongar tíðir við ongum, ið boð berast um.

Hóast staðið mangan søguliga hevur verið kallað oyði, so hevur verið lív, og fólk í hópatal hava búð á staðnum undir góðum korum í ártúsund, tí her vóru røttu umstøðurnar; stór øki til djór at ganga á beiti, jørðin løtt at velta og dyrka, havið var góður hjallur, og handilsvegur var til økini sunnanfyri.

Við Tjæreborg við Esbjerg funnu fornfrøðingar t.d. gravstað við tveimum vælhavandi hjúnum. Yngra høvdingafrúan hevði í grøv síni ríkidømi, m.a. perluhálsketu við 227 perlum úr rav, glasi og gulli. Annað, ið funnið er, ber eisini boð um góðar dagar í fornum tíðum í økinum kring Esbjerg, har rav, norðurlendska gulli, jú finst í mongdum framvið vesturstrond Jútlands.

### List ella leik

Í dag er aftur lív g góðir dagar í Esbjerg, býnum, har øll eiga at finna okkurt, ið teimum dámar, tí tilboðini vanta ikki.

Sjóvegis bjóða 4 stórar standmyndir teim komandi vælkomnum, og kemur ein við bili, so er t.d. áhugavert at síggja stóra heyggin, sum á nátt er ljósprýddur. Bæði listaverkini eru hámett í dygd, og eru eisini serstøk, tí tey eru so serstakliga stór. Standmyndirnar eru 19 metrar høgar, og ljósheyggurin er størsta listaverk í Danmark, og er 180 metrar í tvørmát.

Jú, sanniliga, Esbjerg er býur, ið verdur er at vitja, hvørt áhugin so er til list ella leik.

Dagfinn Olsen
dagfinn@sosialurin